umhvørvisstovan

# Ískoyti til umhvørvisgóðkenning

**hjá P/F Luna, HFS mál nr. 614-98-0021-4, US mál nr. 13/00353**

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Luna** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Við Ánna 1, 512 Norðragøta | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Aling av laksi og síli | |
| Aliloyvi.: | Alifjørður: |
| C-18 | Vestmannasund |
| Alistøð: | Aliøkið: |
| AS-01 | A-88<br>A-08 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 13/00353-95 | 21. mai 2021 |

Umhvørvisstovan, tann 21 mai 2021

Suni Petersen, deildarleiðari

Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri

# 1. Umsókn

P/F Luna hevur ætlanir um at ala laks á einum nýggjum aliøki í Bug við Vágalandið í Vestmannasundi. Í hesum sambandi hevur P/F Luna hin 22. mars 2021 sent umsókn til Umhvørvisstovuna um at víðka umhvørvisgóðkenningina, HFS mál nr. 614-98-0021-4, US-mál nr. 13/00353, á alifirði C-18, Vestmannasund, til eisini at umfata nýggja aliøkið suðuri í Bug.

# 2. Góðkenning og heimild

Sambært galdandi umhvørvisgóðkenning fyri alivirksemi á C-18, Vestmannasund, má virkið ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum og at varðveita lívfrøðiliga margfeldið.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

# 3. Málsviðgerð

Tilfar frá P/F Luna um staðseting av nýggja aliøkinum suðuri í Bug og kanningar av botnviðurskiftunum, streymi o.ø. á økinum, hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

Alivirksemið knýtt at aliloyvi C-18 umfatar sum nú er alivirksemi á sjónum á aliøki A-88 í Vestmanna og tilhoyrandi landstøð AS-01. P/F Luna hevur tann 19. januar 2021 sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni umsókn um loyvi til nýtt aliøki í Bug í Vestmannasundi.

Hetta ískoyti til umhvørvisgóðkenningina umfatar alt alivirksemið hoyrandi til aliloyvi C-18, Vestmannasund, við møguligum tilhoyrandi ískoyti til aliloyvið. Stødd og staðseting av aliøkjunum, har alivirksemi kann fara fram, verður ásett í loyvisbrævi til aling á sjónum ella tilhoyrandi ískoyti, sum verður givið av Aliumsitingini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Aling hevur verið í Vestmanna síðan 1986 og hava fleiri ymisk aliøki verið á alifirðinum. Í løtuni er eitt aliøki í Vestmannasundi, A-88, sum er millum Vál og Egilsnes. Nýggja aliøkið A-08, fer eftir ætlan at vera suðurin í Bug, við tunnilsmunnan á Vágoynni.



Mynd 1: ætlað staðseting og stødd av aliøkinum suðuri í Bug

Økið suðuri í Bug er valt, tí væntandi er, at tað er vart nakað fyri harðasta rákinum í sundinum, umframt at tað er meira enn 5 km frá aliøkinum í Vestmanna. Økið er sunnarlaga í Vestmannasundi í einum bugi. Mett verður, at skapið á botninum beinir rákið útfrá á báðum sjóvarføllunum. Tað er rímiliga djúpt fram við landi, og eitt alibrúk kann tí liggja nóg nær landi, at tað ikki verður rakt av harðasta sjóvarfallinum.

Botnurin er kannaður við sidescan, sum gevur eina ábending um, hvussu botnurin sær út, og hvat tilfarið er. Kavari hevur eisini verið á botninum. Kanningarnar vísa, at botnurin er mest hella og í støðum er sandur innast við land.

Streymmátingar eru gjørdar á økinum, bæði frá botni og frá báti. Mátingarnar vísa, at harðasta rákið er uttast á hornunum á aliøkinum, og at her fer rákið upp um 2,5 m/s. Aðrastaðni á aliøkinum fer rákið lítið uppum 2 m/s. Har ramman helst fer at liggja, er harasta rák 2,2 m/s á uttaru síðu og 2 m/s á innaru síðu. Eystfallið rekur harðast, og tað rekur eisini longur enn vestfallið.

P/F Luna hevur gjørt eina royndarverkætlan á økinum, har ein streymverja er sett út fyri at tálma streymferðina, so at tað verður gjørligt at ala laks á økinum. P/F Luna metir, at hesar royndir hava gingið væl. Úrslitini vísa, at við streymverjuni ber til at temja streymferðina frá 2,2 m/s niður um 1 m/s, sum er áleið tað sama sum á aliøki A-88 í Vestmanna.

Tað harða rákið og góða sjógvútskiftingin á økinum í Bug ger, at lítil sedimentering av skarni og fóðri kann væntast frá alivirkseminum. Tískil er mett, at tað er umhvørvissliga ráðiligt at ala á økinum, og P/F Luna metir, at umstøðurnar hjá fiskinum eru góðar.

Sambært P/F Luna er ætlanin at skipa nýggja aliøki A-08 sum eitt sjálvstøðugt aliøki, við eini nýggjari landstøð á Oyragjógv. Inntil nýggja landstøðin á Oragjógv er klár, er ætlanin hjá P/F Luna at reka aliøki A-08 saman við landstøð AS-01 í Vestmanna.

Umhvørvisstovan metir, at treytirnar í verandi Umhvørvisgóðkenning, HFS mál nr. 614-98-0021-4, US mál nr. 13/00353, fyribils eru nøktandi fyri at hava eftirlit við nýggja aliøki A-08 í Vestmannasundi.

## 4. Hoyring

Uppskot um ískoyti til umhvørvisgóðkenningina var sent alifelagnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Vága kommunu til hoyringar hin 29. apríl 2021.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Vága kommuna og alifelagið høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið um ískoyti til umhvørvisgóðkenningina.

## 5. Avgerð

Umhvørvisstovan gevur ískoyti til verandi umhvørvisgóðkenning, HFS mál nr. 614-98-0021-4, US mál nr. 13/00353, fyri alivirksemi á aliøki A-08 og tilhoyrandi landstøð á alifirði C-18, Vestmannasund.

Verandi umhvørvisgóðkenning, HFS mál nr. 614-98-0021-4, US mál nr. 13/00353 frá 31. august 1998 við ásettum treytum, er eisini galdandi fyri alivirksemið á aliøki A-08 og tilhoyrandi landstøð á alifirði C-18, Vestmannasundi.

## 6. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:**

Vága kommuna, hammersheimbsvegur 1, 360 Sandavágur
Heilsufrøðiliga starvsstovan, Smyrilsvegur 7, 2. hædd, 100 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, 110 Tórshavn